# GÓÐ TÍÐINDI

Himmal og jørð skulu forganga, men orð Míni skulu als ikki forganga.
Matt 24:35

NR. 2 / MAI 2023 / ÁRGANGUR 32


## Er Bíblian álítandi?

Gjøgnum tíðirnar hava mong álop verið gjørd á Bíbliuna við tí endamáli at gera boðskap hennara til einkis.

### Hevur nú Gud sagt!

Longu í 3. kapitli í Fyrstu Mósebók lesa vit um ormin, sum setti spurnartekn við tað, sum Gud hevði sagt – at tað fór at fáa álvarsamar avleiðingar, um tey ótu av forbodnu fruktini. Hann segði við Evu:
„*Hevur nú Gud sagt: …?*"

Soleiðis fekk ormurin Evu at ivast um orð Guds og segði við hana:
„*Einki skulu tit doyggja!*" (1. Mós. 3:1-4).

Eva og Ádam vóru ólýðin og gjørdu ímóti boði Guds!

Avleiðingarnar av hesum ólýdni hava verið ræðuligar! Syndin kom inn í mannaættina og deyðin við syndini, og síðan tá hevur mannaættin verið merkt av sjúku, vanlukku, kríggi og deyða.

Eins og var í Eden, hevur aftur og aftur verið sett spurnartekn við tað, sum Gud hevur sagt! Undirtónin hevur verið og er, at tað fær ongar avleiðingar, um vit gera ímóti orði og boði Guds.

### Samljóð ímillum bøkur Bíbliunnar

Bíblian er samansett av 66 bókum, ið eru skrivaðar yvir eitt umleið 1600 ára langt tíðarskeið, og er tað undrunarvert, hvussu gott samljóð er ímillum tær.

Bíbliuatfinnarar hava hildið upp á, at nógvar av bókunum eru skrivaðar langt aftan á, at hendingarnar fóru fram, og at tær heldur ikki eru skrivaðar av teimum, ið tær bera navnið á. Soleiðis hevur verið sáddur ivi, um tær eru álítandi og søguliga eftirfarandi.

Hesar atfinningar fingu álvarsom skot fyri bógvin eftir seinna heimsbardaga, tá ið elligomul handrit komu undan kavi við Deyðahavið.

### Álítandi handrit

Áðrenn Deyðahavs bókrullurnar vórðu funnar í 1947, vóru tey elstu handritini av Gamla Testamenti frá umleið ár 800-900 e.Kr. Men tá ið bókrullurnar við Deyðahavið vóru funnar, varð Gamla Testamentið flutt umleið 1000 ár aftur. Ein bókrulla við Esaiasi profeti, ið varð funnin, varð dagfest til umleið ár 200 f.Kr. Og tað vísir seg eisini, at innihaldið í hesum gomlu bókrullum er neyvt tað sama sum í teimum yngru, avskrivaðu handritunum!

Av Nýggja Testamenti finnast umleið 6000 handrit í tíðarskeiðinum frá aðru øld og til fimtandu øld. Og út frá teimum kann staðfestast, at innihaldið, ið vit hava í dag, er júst tað sama, sum høvundarnir skrivaðu upprunaliga.

### Vitnisburðir hjá høvundum

Fleiri av høvundum Nýggja Testamentis vóru eygnavitni til Jesus og tað, ið Hann gjørdi og segði.

Pætur ápostul sigur í Seinna brævi sínum:
„*Tí ikki var tað snilt upphugsaðum ævintýrum, vit gingu eftir, táið vit kunngjørdu tykkum kraft og komu Harra okkara Jesu Krists; nei,* ***vit vóru eygnavitni til hátign Hansara!***" (2. Pæt. 1:16).

Jóhannes ápostul sigur í Fyrsta brævi sínum:
„*Tað, sum var frá upphavi, tað, sum vit hava hoyrt,* ***tað, sum vit hava sæð við eygum okkara,*** *tað,* ***sum vit skoðaðu, og hendur okkara numu við*** *– tað er Orð lívsins, vit tala um.*" (1. Jóh. 1:1).

Eisini læknin, Lukas, sum ikki sjálvur var eygnavitni, fór gjølliga til verka, áðrenn hann skrivaði sítt evangelium og Ápostlasøguna. Hann sigur:
„*Við tað at mangir hava tikið sær fyri at seta saman frásøgn um tað, sum hent hevur millum okkara –*
*soleiðis sum teir, ið av fyrstu tíð vóru eygnavitni, og sum gjørdust tænarar orðsins, hava sagt fyri okkum –*
*so havi eisini eg,* ***eftir at eg gjølla havi rannsakað alt*** *av fyrstu tíð, sett mær fyri at skriva tær tað niður, hvørt eftir annað, hávirdi Teofilus, fyri at tú kanst sanna, hvussu álítandi tað er, sum tú hevur hoyrt frásagt.*" (Luk. 1:1-4).

### Jesus og Skriftin

Jesus hevði fult álit á Gamla Testamenti.



Hann sigur í fjallataluni:
„*Hugsið ikki, at Eg eri komin at seta lógina úr gildi – ella profetarnar! Eg eri ikki komin at seta úr gildi, men at fullkoma.*
***Tí sanniliga, sigi Eg tykkum: Inntil Himmal og jørð forganga, skal ikki minsti bókstavur ella prikkur av lógini forganga,*** *fyrrenn tað alt hevur hent.*" (Matt. 5:17-18).

Í eini samrøðu við jødarnar segði Jesus um Gamla Testamenti:
„*Hevur Hann nú kallað teir gudar, sum orð Guds kom til –* ***og skriftin vikast ikki*** *– siga tit tá við Hann, sum Faðirin hevur halgað og sent í heimin: „Tú spottar Gud!" – fyri tað at Eg segði: „Eg eri Sonur Guds"?*" (Jóh. 10:35-36).

Í evangeliunum síggja vit eisini Jesus aftur og aftur leggja dent á, at alt, sum hendi Hann, var fyri at Skriftin skuldi ganga út. Alt lív Hansara var í fullum samsvari við Gamla Testamenti.

### Ápostlarnir og Skriftin

Pætur hevði fult álit á Skriftini. Tað síggja vit týðiliga, tá ið hann skrivar um hendingina á fjallinum saman við Harranum, har Hann sást í dýrd:
„***So mikið meiri staðfest hava vit hitt profet-***

***iska orðið**, sum tit gera væl í at akta eftir …*
*Fyrst og fremst mugu tit vita tað, at einki profetorð í skriftini er givið til egna týðing.*
***Tí aldri er nakað profetorð komið fram av vilja menniskja; nei, drivnir av Heilaga Andanum talaðu heilagir menn Guds.**“*
(2. Pæt. 1:19-21).

Eisini roknar Pætur brøv Paulusar at vera part av Skriftini. Hetta síggja vit í hesum orðunum í Seinna brævi hansara:
*„… Hetta er tað, sum elskaði bróðir okkara Paulus hevur skrivað tykkum eftir vísdóminum, ið honum er givin.*
*Tað ger hann eisini **í øllum brøvum sínum**, táið hann í teimum talar um hetta; í teimum er eitt og annað, sum torført er at skilja, og sum hini ólærdu og ófestu útleggja skeivt – **hetta gera tey eisini við hinar skriftirnar**, sær sjálvum til undirgang.“* (2. Pæt. 3:15-16).

Paulus sigur um Skriftina:
*„**Øll skriftin er innblást av Gudi** og er nyttulig til lærdóm, til sannføring, til rættleiðing, til uppfostran í rættvísi,“* (2. Tim. 3:16).

## Útgrevstur

Nógvir útgrevstrar í Ísrael og aðrastaðni í Miðeystri hava staðfest, at hendingarnar í Bibliuni eru sannar. Hesir útgrevstrar staðfesta, at Dávid veruliga var kongur í Ísrael, at múrar Jerikos fullu, at bábylonar hertóku og burturfluttu Ísrael og nógvar aðrar hendingar.

Eisini eru søguligar keldur uttan fyri Bibliuna, sum staðfesta hendingar og persónar í Bibliuni. Søguskrivarin Josefus (um 37-100 e.Kr.) hevur t.d. nevnt bæði Jesus og Jóhannes doypara og eisini Jákup, bróður Jesusar í sínum verkum.

## Profetiir

Tað, sum á ein serstakan hátt ger Bibliuna til eina bók, sum er so nógv øðrvísi enn aðrar bøkur, er, at hon sigur frá hendingum mong hundrað ár framman undan, at tær fóru fram.

Her kunnu vit t.d. nevna øll profetiini um lív og deyða Jesusar, sum eru at finna í Gamla Testamenti. Longu í 3. kapitli í Fyrstu Mósebók, fáa vit eina ábending um krossfesting Jesusar:
*„Eg seti fíggindskap millum teg og kvinnuna, millum títt avkom og hennara avkom; Hann skal sora høvdið á tær, men **tú skalt høgga Hann í hælin**.“* (1. Mós. 3:15).

Eisini lesa vit í Sálmi 22 og í Esaiasi 53 meiri nágreiniliga um krossfesting og deyða Jesusar. Í hesum kapitlum síggja vit, hvussu Jesus varð viðfarin og enntá, hvat Hann segði á krossinum.

Og allar ofringarnar í Gamla Testamenti vísa okkum á endamálið við komu Jesusar – at tað var fyri at verða eitt offur fyri syndir okkara, soleiðis, at vit kundu koma til Gud.

Jesus segði eisini frá hendingum, sum skuldu fara fram seinni. Hann segði frá um oyðilegging Jerúsalems umleið 40 ár, áðrenn hendingin fór fram, ár 70 e.Kr., tá ið jødarnir mistu sítt land og vórðu spjaddir kring knøttin.

## Profeti um seinastu dagar

Biblian sigur eisini frá, at jødarnir skuldu fáa land sítt aftur ímóti endanum av tíðini – og fór tað fram í 1948, tá ið staturin Ísrael varð endurstovnaður.

Men tað eru profeti, sum Biblian talar um, sum ikki eru gingin út enn. Biblian sigur frá, at móti enda tíðanna skulu torførar tíðir koma við ófriði, kríggi, hungri, sjúku og jarðskjálvta. – Er tað hetta, ið vit í dag síggja byrjanina av?

Biblian talar eisini um, at heimsleiðari skal stíga fram, ein friðarmaður, sum í Bibliuni verður nevndur Antikristus, sum eitt stutt tíðarskeið skal fáa frið í lag á jørð. Men hesin karismatiski persónur, sum er eitt ódjór í seyðaskinni, hevur til endamáls at villleiða menniskjuni og fáa tey at tilbiðja seg sum Gud.

Hesin skal seta eina skipan í verk á jørð, har reiður peningur ikki verður brúktur meir, men í staðin eitt merki á hondina ella á pannuna. – Er tað hetta, sum vit síggja byrjanina av í dag, sum vit ganga meir og meir yvir til at brúka tráðleyst (talgilt) gjald?

## Ein forboðin bók

Sum nevnt, so hevur heilt frá fyrstum verið roynt at forða fólki at koma fram at orði Guds og at sáa iva um tað.

Fara vit aftur í miðøldina, so var Biblian nógvastaðni ein forboðin bók. Eingin hevði loyvi sjálvur at lesa Bibliuna, men var tað katólska kirkjan, sum skuldi útleggja hana.

Tað var vandamikið at eiga eina Bibliu. Hon varð lisin í loynd, aftan fyri stongdar dyr og goymd fyri jesuitamunkum og hermonnum, sum leitaðu eftir hesum ólógligu Biblium. Um hon varð funnin, varð hon gjørd til einkis, og tey, ið goymdu hana, vórðu revsað, enntá við deyða.

## Biblian út til fólkið

Eftir trúbótina varð Biblian so við og við umsett til málið, ið fólkið skilti. Nógvastaðni hevði tað við sær umfatandi vekingar, ið komu at hava stórt árin á mong lond. Hetta hevði eisini við sær meiri frælsi, og samvitsku- og trúarfrælsi varð sett í verk nógvastaðni.

Men nú Biblian kom út til fólkið, komu álopini frá einum øðrum móti. – Nú mátti okkurt annað gerast, fyri at fáa fólk at missa álitið á hana.

Nú varð ført fram, at Biblian er ikki orð Guds, men bert orð um Gud, sum nøkur primitiv fólk hava skrivað niður.

Á universitetum var søgu-kritiska teologiin við yvirlutan. Nú varð Biblian viðgjørd sum ein bók, ið ikki var álítandi søguliga ella á annan hátt, men var full av mýtum.

## Tíðarandin

Í Bibliuni fáa vit greitt at vita, at tað er eitt rák í tíðini, ein tíðarandi, sum stýrir hugsanum menniskjans. Ein høvdingi stendur aftan fyri hetta rák, sum Paulus sigur við Efesusmenn:
*„Eisini tykkum hevur Hann gjørt livandi, tykkum, sum deyð vóru í misbrotum og syndum tykkara,*
*sum tit áður livdu í **eftir tíðarandanum** í hesum heimi, **eftir høvdinganum yvir hervaldinum í luftini**, andanum, sum nú virkar í børnum ólýdnisins.“* (Ef. 2:1-2).

Í 6. kapitli í Efesusbrævinum áminnir Paulus okkum ímóti hesum høvdinga og heri hansara og sigur:
*„Latið tykkum í øll herklæði Guds, so tit kunnu vera ment at standa tykkum móti svikaálopum Djevulsins!*
*Tí hjá okkum stendur bardagin ikki við blóð og hold, men við tignirnar og veldini, við harrar heimsins í hesum myrkri, við andaher óndskaparins í himmalrúminum.“*
(Ef. 6:11-12).

Í Opinberingini verður hesin høvdingi, ið stýrir tíðarandanum, nevndur:
*„… hin gamli ormur, sum kallast Djevulin og Satan, hann, ið villleiðir allan heimin; …“*
(Op. 12:9).

## Hvør stýrir tær?

Hin gamli ormur, ið villleiddi fyrstu menniskjuni, er virkin enn í dag!

Hvussu er hjá tær – ert tú stýrdur av tíðarandanum og høvdinga tess? Um so er, so ert tú á veg inn í ein fortaptan ævinleika.

Men, tað er vón fyri tær! – Trúgv boðskapi Bibliunnar um Jesus Kristus, sum doyði fyri allan heimin – eisini fyri teg! Tak ímóti Jesusi sum Frelsara og Harra tínum, Honum, sum elskar teg og vil tær alt tað besta. – Tá ert tú tryggur, bæði nú og um ævir!

*John í Skemmuni*


**GÓÐ TÍÐINDI** NR. 2

Útgevari: Góð Tíðindi
Konto í Betri: 9181 5604941
Ábyrgd: John í Skemmuni
Umbrot: Else Sjúrðaberg
Prent: Føroya Prent
Blaðið verður sent øllum húskjum í landinum ókeypis.

# Vitnisburður

## Anton Petersen



Anton er føddur í Vági. Foreldur hansara vóru Frederikka Petersen og George McKay. Pápin var skoti og hermaður í bretska herinum í Føroyum undir krígnum.

Stutt eftir at Anton var føddur, varð pápin, George, kallaður aðrastaðni í hertænastu, og foreldrini komu ikki í samband við hvørt annað aftur. Pápin varð seinni giftur í Skotlandi.

Anton vaks upp í Vági og búði hjá abbanum og ommuni í Toftum. Sum 14 ára gamal fór hann til Ólavsvíkar í Íslandi at arbeiða og sigldi eisini har.

Anton giftist í 1963 við Onnu Mariu Strøm, og tey búsettust í Vági. Tey fingu børnini Mary, Boga og Dianu.

Anton hevur verið sjómaður. Hann hevur verið við garnabáti og trolara og hevur eisini róð út. Hann var parteigari í bátinum Kyrjasteini, sum royndi við línu og gørnum undir Føroyum, Íslandi og Grønlandi.

Anton hevur eisini arbeitt ymisk skeið á landi. Hann hevur verið við í trimum tunnilsarbeiðum – í Botni í Suðuroynni, í Grønlandi og í Íslandi.

Seinastu árini arbeiddi Anton hjá Vágs kommunu við ábyrgd av kirkjugørðum og minnisvarða.

Anton eigur fýra yngri hálvsystkin í Skotlandi, og vóru hann og døturnar og vitjaðu tey í 1992. Seinni hava tey aftur verið og vitjað har.

Anton og konan, Anna Maria, høvdu eitt gott lív saman, hóast konan var sjúk í eini 30 ár. Hon andaðist í 2020.

### Anton greiðir soleiðis frá umvending síni

Sum óviti gekk eg í sunnudagsskúla, men tó hugsaði eg ikki um tað andaliga. Sum eg vaks til, fór eg til arbeiðis og til skips, men um Gud var til ella ikki, kom mær ikki til hugs. Konan gekk á møti í Meinigheitshúsinum, og eg plagdi at koyra hana hagar, tí hon hevði ikki koyrikort.

Eitt sunnukvøld í 1997, eftir at eg hevði koyrt hana á møti og var á veg heim aftur, hugsaði eg, at nú skuldi eg fáa mær nátturða og so seta meg at hyggja í sjónvarp. Eg var einsamallur inni.

Sum eg gekk yvir til køliskápið, hoyrdi eg meg sjálvan rópa:

„Anton, hví fert tú ikki á møti?“

Eg hvakk við og segði:

„Anton, hvat var tað, tú segði?“

Eg setti meg í ein stól og hugsaði eina løtu um, hvat hetta var fyri nakað. – Hetta var helst okkurt tilvildarligt, sum hendi, hugsaði eg.

So reisti eg meg aftur og skuldi fara at seta á borðið. Men nú kom ein undarligur ófriður á meg, og eg fór at ristast. Eg hugsaði um, hvat mundi vera áfatt. Síðan gekk eg fleiri ferðir inn í stovuna og út aftur í køkin og hugsaði:

„Hvat er hetta, sum hendir her?”

Tá kom henda hugsan knappliga til mín:

„Hevur tú ikki hoyrt tey trúgvandi tosa um at verða kallaður? Er tað ikki tað, sum hendir nú?“

„Her er okkurt,” segði eg við meg sjálvan.

Tá ið eg gekk út aftur í køkin, fekk eg eyga á eina Bíbliu, sum stóð á eini hill, mest sum til pynt. Eg tók hana og fór út í køkin. Eg legði hana á borðið og setti meg niður.

Men hvat skuldi eg nú gera? Væl dugdi eg at lesa, men at lesa í Bíbliuni dugdi eg ikki. Eg skilti hana ikki.

So legði eg hondina á Bíbliuna og segði:

„Gud, ert tú til? Er tað Tú, sum kallar á meg? Og um tað er sannleiki, sum stendur í Bíbliuni, kanst Tú so siga mær tað við einum orði.“

Ein krukka við mannakornum stóð á borðinum, sum konan plagdi at gera nýtslu av. Eg taki so eitt mannakorn, og fekk eg eitt bíbliuvers, Orðtøkini 8:8, og eg las:

„Rætt eru øll orðini av munni mínum, í teimum er einki fals ella svik.“

Hetta greiða svarið fór ígjøgnum meg sum ein ylur, og eg varð sannførdur um, at tað var Gud, ið kallaði á meg. Tá kom eg til persónliga trúgv á Jesus og gav meg yvir í hendur Frelsarans, sum doyði fyri meg á krossinum.

Konan, Anna Maria, kom ikki beinanvegin aftur av møtinum, tí hon var farin at vitja onkran. Hon var komin til trúgv á Jesus umleið 2 ár frammanundan og hevði vitnað um tað í Meinigheitshúsinum.

Eg var spentur at siga konuni frá tí, sum eg hevði upplivað. Og tá ið hon kom heim, segði eg henni frá øllum. Tá fortaldi hon mær, at hon hevði ikki viljað lagt trýst á meg um at koma á møti, men at hon hvønn morgun og hvørt kvøld, seinastu 2 árini, hevði biðið Harran um, at Hann skuldi kalla á meg. – Hetta kvøldið var stór gleði í heimi okkara.

Stutt eftir at eg var komin til trúgv – hetta var á jóansøku – var eg farin oman á Fornminnissavnið, sum var í Gamla skúla, at lata upp. Tá eg var á veg aftur í bilin, stóð ein maður fyri mær og segði, at ein maður lá á vegnum har tætt við, og at hann bløddi. Hann fekk ikki sjálvur hjálpt honum.

Eg fór so yvir til hansara, lyfti hann upp og styðjaði hann inn í bilin hjá mær og tók hann heim til okkara. Hann var ávirkaður, men bløðingin var steðgað. Eg vaskaði blóðið av andliti hansara, gav honum at eta og legði hann á sofuna. Hann hevði sukursjúku, men hevði gloymt sproytuna eftir í Havnini.

Eg sendi so boð eftir lækna og spurdi, hvat ið var at gera. Læknin segði, at hann mátti ikki smakka meiri spiritus og fara til Havnar við fyrsta farti.

Tá ið maðurin var farin, takkaði eg Gudi fyri, at alt spældi væl av. Í sama viðfangi tók eg eitt mannakorn og fekk ørindið, sum stendur í Triðju Mósebók 25:35.

„Tá ið bróðir tín kemur í armóð og er ikki mentur at bjarga sær longur, skalt tú styðja hann; sum fremmandur og innfluttur skal hann liva hjá tær.“

Hetta var júst tað, ið eg hevði gjørt við áðurnevnda mann, og styrkti hetta orðið meg veruliga í trúnni, at eg hevði ein Harra og Frelsara, sum tekur Sær av barni Sínum.

Eg hevði tað gott andaliga í einar 3-4 mánaðir. Men so gjørdi Djevulin álop á meg við iva. Men eg kom burtur úr aftur hesum við at hugsa um undurfulla skapanarverkið – at tað er ein stórur Skapari av øllum. Og eg helt eisini fram við at koma til møtini og at lesa í orði Guds. Soleiðis kom eg styrktur úr hesi royndini.

Eftir umvending mína gingu eg og Anna Maria saman á møti í Meinigheitshúsinum. Og vit komu eisini til møtir aðrastaðni. Vit vóru til bíbliuskeið í Nesvík í mong fylgjandi ár, og seinni havi eg eisini verið til bíbliuskeið í Zarepta.

Konan og eg hava havt góðar andaligar stuðlar í lívinum. Millum teirra eru Róald Norðberg og kona hansara, Ása. Róald og eg komu at kennast fyrst í 1960-unum umborð á trolaranum Vágbingi, og hevur tað síðan tá verið eitt serligt vinaband okkara millum. Ása og Róald eru javnan komin á gátt hjá okkum, og var Anna Maria altíð so hjartans glað, tá ið tey komu á vitjan.

Eg havi framvegis, sum eg eldist, mítt dagliga samfelag við Harran í bíbliulesnaði og í bøn. Eg komi eisini regluliga til møtini í Bethel í Vági, og trívist eg sera væl har.

Mín bøn fyri øllum landsmonnum mínum er, at teir skulu koma at kenna sama Frelsara, sum eg eri komin til trúgv á.

# Er hetta tekin um, at vit eru komin inn í endatíðina?

Greinin niðanfyri, sum stendur í tíðarritinum *Prophecy News Watch*, er sera hugvekjandi og eigur at stuðla upp undir, at vit taka orð Guds í álvara. Evnið í greinini er umtalað í 13. kapitli í Opinberingini.

Tá ið tað, sum fer at henda í stóru trongdini, kastar sínar skuggar á okkum, sum liva í náðitíðini, so eiga vit at ásanna, at afturkoma Jesusar er sera nær. Greinin er frá mai 2022.



## Eitt mikrokipp afturat at seta í hondina komið á marknaðin

Ein fyritøka í London hevur ment eina nýggja tráðleysa gjaldsskipan, sum fevnir um at seta eitt mikrokipp inn í hondina á fólki.

Tøknifelagið Walletmore hevur ment eina nýggja app, ið nevnist Purewrist, sum er ein talgild mappa, knýtt at einum mikrokippi, sum kann verða sett inn í hondina. Tá ið kippið er sett í, kanst tú nýta appina og kippið at gjalda teimum fyritøkum, ið nýta appina.

## Sera lítið, og lætt at brúka

Kippið hjá Walletmore er sera lætt og er bert eitt vet størri enn eitt rískorn og er samansett av einum mikrokippi og eini antennu, sum er umgird av biopolymer [eitt slag av plasti, ið er framleitt úr livandi kyknum].

Stjórin í fyritøkuni, Wojtek Paprota, sigur, at tað er fullkomiliga trygt og er góðkent av myndugleikunum.

Walletmore hevur ásett kostnaðin at fáa kippið ísett til 299 dollarar [um 2.000 kr.] og sigur, at skipanin kann brúkast til at fremja vanligar gerandisflytingar.

„Kippið at seta í hondina kann nýtast til at gjalda fyri at fáa sær okkurt at drekka á strondini í Rio, ein kopp av kaffi í New York, eina klipping í París – ella okkurt í vanliga handlinum á staðnum,“ sigur stovnarin og fyrisitingarstjórin, Wojtek Paprota, í eini samrøðu við BBC. „Tað kann nýtast allastaðni, har tikið verður ímóti tráðleysum gjaldingum.“

Mikrokippinum tørvar ikki battarí, og tað hevur heldur ikki tørv á aðrari streymkeldu. Hetta ger tað sera freistandi at nýta hjá brúkarunum. Higartil eru fleiri enn 500 mikrokipp seld.

Ein kanning frá 2021, sum varð gjørd í ES og Bretlandi, vísti, at minst 51% av fólkinum fara at hugsa um at fáa kippið sett í likamið.

## Svøríki og mikrokipptøkni

Í Norðurevropa hevur Svøríki í eina tíð víðkað nýtsluna av mikrokipptøkni við fúkandi ferð. Fólk í tíggjutúsundatali hava longu fingið mikrokippið ísett.

Pengaseðlar og myntir eru í løtuni minni enn 1% av peningarenslinum í Svøríki. Hetta ljóðar løgið, tá ið hugsað verður um, at Svøríki var fyrsta evropeiska landið, ið gav út nútíðar pengaseðlar í 1661.

„Tikið verður ikki móti reiðum peningi!“ Hesi skelti eru nú nær um allastaðni í handlum í Svøríki, so hvørt sum gjaldingar verða talgildar og mobilar. Men nógvir sviar vilja taka næsta stigið – at sameina tøknina við mannalikamið.

Mikrokipp, sum eru sett í hondina, og sum geva fólki møguleika at fremja sínar pengaflytingar, at vakja yvir heilsustøðuni (íroknað støðuna við koppseting), og sum enntá koma í staðin fyri lyklakort til skrivstovur og bygningar, er eitt nýtt mótarák, og fólk í túsundatali hava longu fingið mikrokipp sett í seg.

Mong, sum eru eldhugað í tøkni, halda, at hetta er næsta sjálvsagda stigið í einum talgildum samfelagi, sum einki hevur ímóti at sleppa privatlívi hins einstaka, fyri at alt skal verða høgligari. At tað er høgligari, er ein týðandi orsøk til, at tey, ið ferðast dagliga við SJ tokunum í Svøríki, hava skift reiðan pening um við kippið.

## Merki Dýrsins

Nógvir serfrøðingar í profetium í Bibliuni halda, at hvørt av hesum fetum tekur okkum nærri alheims góðtøku av einum talgildum merki, sum vanliga verður nevnt „merki dýrsins“, sum fer at sameina tøkni og handil við politiskan og átrúnaðarligan trúskap, sum lýst verður í Opinberingini.

Flestu trúgvandi ásanna, at núverandi kippini, ið verða sett í hondina, ikki eru veruliga „merki dýrsins“. Men kortini verður stúrt fyri, at tað at góðtaka slíka tøkni fyrireikar fólk til tíðarhvarvið, tá ið veruliga merkið kemur.

Tað, sum ofta byrjar sjálvboðið, kann eins léttliga gerast eitt krav, og hóast sjálv tøknin kann vera óskaðilig, so kann hon vera sera vandamikil í hondunum á ranga persóninum. – Hugsa tær um tøknin nú á døgum var í hondum Hitlers.

Trúgvandi hava leingi kjakast um týdningin av „merki dýrsins“. Men okkara ættarlið tykist vera tað fyrsta, sum hevur tøknina til at uppfylla hetta profetiið.

Tú verður kanska skjótt noyddur at svara spurninginum:

„Hevði tú kunnað hugsað tær at fingið kippið sett í hondina?“

(Úr *„Prophecy News Watch“* – John umsetti)

***

Kæri lesari.

Jesus kann koma aftur hvørja løtu! – Ert tú til reiðar til komu Hansara, ella verður tú latin eftir? – Fyri at verða við tá ið Jesus kemur, er neyðugt, at tú kemur til persónliga trúgv á Hann.